# ngar sovið í tímanum!

føroyskir myndugleikar seta pening av til endamálið, vísir Elisabeth Holm á.

Og tað er kanska eitt eymt evnið í hesum døgum.

– Fyri meg er hetta ikki ein spurningur, um vit hava ráð at vera við, men um vit hava ráð at lata vera. Tí um koma við í samstarvið fáa vit nøkur týdningarmikil rættindi, vísir Elisabeth Holm á.

Tað gevur millum annað rætt til at søkja ES-stuðul til útbúgvingarvirksemi á jøvnum føti við aðrar borgarar í ES.

– Verða vit alment við í samstarvinum, nýtast vit ikki at eyðmýkja okkum við at ganga ígjøgnum ymsar bakdyr. Tá verður til dømis eingin forðing hjá lærarum og starvsfólki á skúlaøkinum at biðja um samstarv við okkum, sigur Elisabeth.

Í verandi støðu ber ikki til hjá ES-borgarum at nýta ES-pening til at vitja eitt 3. land sum okkum, fyri at koma til Føroyar á fundir, skeið, lestrarferðir og annað.

## Fyrimunir við LLP samstarvinum

Sambært Elisabeth Holm er tað týdningarmikið at Føroyar fáa sær atgongd til samstarvið.

– Um Føroyar koma við í LLP fara vit at fáa eitt altjóða samstarv, ið mennir skúlaverkið og gevur interkultrellar førleikar. Bæði næmingar, lesandi og lærarar fara at fáa altjóða royndir, og samstarvið fer at lata upp fyri nýhugsan og innovatión, sigur hon.

Harafturat fáa vit atgongd til bæði fakliga og persónliga førleikamenning, umframt eftirútbúgvingarmøguleikar.

– Við at býta royndir millum okkara, kunnu vit læra av øðrum og fáa íblástur. Vit fáa innlit í útbúgvingarskipanir í øðrum londum, og fáa møguleika at menna okkara málsligar førleikar og skapa netverk. Og í mun til at vera passivir eygleiðarar, verða vit virknir luttakarar, vísir Elisabeh á og heldur fram.

– Tað er harumframt í tráð við bæði samgonguskjalið og visjón 2015, so tað skuldi ikki verið politiskur illvilji ímóti at lata hesar dyrnar upp.

## Gevið fólki møguleikar!

Innan hægri útbúgvingar liggja veldugir menningarmøguleikar, um vit fáa skipað samstarv umvegis Erasmusskipanina. Orsøkirnar eru fleiri.

– Kanska verður tað meira lokkandi at lesa í Føroyum, um tað verður eitt natúrligt tilboð hjá øllum lesandi at taka ein part av lestrinum í øðrum landi, og um útlendskir studentar uttan forðingar kunnu koma til Føroyar í eitt tíðarskeið.

– Og hugsa vit um flytføri hjá starvsfólkum, so fáa tey eisini møguleika at fara aðrastaðni at menna seg, uttan at skula siga farvæl við Føroyar, staðfestir Elisabeth.

Nógv verður tosað um at fáa vælútbúgvið fólk at støðast í Føroyum, og hetta hevði verið ein upplagdur møguleiki til tað.

– Í dagsins samfelag er ongin, ið ynskir isolation og stagnatión, men Føroyar eru bæði isoleraðar, og kanska eisini um at stagnera . Hugsandi fólk mennast av og trívast best við at samstarva við onnur tvørturum landamørk. Við at standa uttanfyri avskera vit okkum frá eini ørgrynnu av menningar- og útbúgvingarmøguleikum, slær Elisabeth fast.

Sum er fara nógv tey flestu uttanlands at lesa, og kanningar vísa, at vælútbúgvin vaksin koma ikki heimaftur eftir loknan lesnað. Tað merkir eisini, at tað eru nógv føroysk børn, ið vaksa upp í øðrum londum.

– Heilt stutt kunnu vit siga, at við at luttaka í LLP flyta vit ikki besta tilfeingi okkara - børn, ung og vælútbúgvin vaksin – av landinum. Tvørturímóti fer altjóða samstarvið á útbúgvingarøkinum at geva teimum atgongd til spennandi og mennandi møguleikar her á landi!

Les meiri um eftirútbúgvingar til lærarar: www.ciriusonline.dk/Default.aspx?ID=415.

**Luttakaralond í Lifelong Learning Programme eru:**
**Tey 27 ES limalondini**
**Ísland**
**Noreg**
**Liechtenstein**
**Turkaland**
**EFTA lond við EBS avtalu**

**Higartil hava Føroyar onga avtalu um LLP luttøku, men um neyðug fígging verður sett av til økið, ber til at luttaka sum sonevndur "silent partner". Tað merkir, at vit ikki kunnu søkja stuðul úr ES, men mugu bera allan kostnaðin sjálvi. Men tað vildi givið atgongd til ávís týdningarmikil økið av samstarvinum.**

Skeiðsdatabasa: http://ec.europa.eu/education/trainingdatabase/.



**Ein umfevnadi kanning av Comeniusskipanini vísir staðfestir, at motivatiónin hjá næmingum, sum eru við í tvørlandaligum verkætlanum økist munandi. Tá eitt annað land í Evropa kemur inn í flokshølið hjá børnum og ungum, skapar tað heilt nýggjar lærumøguleikar.**

**Les meiri um kanningina á: http://ec.europa.eu/education/programmes/llp/impact_en.html**



# Lívslong læring – útbúgving innan ES

## Arbeiðið, við at fáa Føroyar uppí stóra útbúgvingarsamstarvið "Lifelong Learning Programme" hjá ES, er mest sum steðgað, hóast tað er av størsta týdningi, at Føroyar gerast partur av tí. Samstarvið snýr seg um at savna allar útbúgvingartræðrirnar heilt frá barnaskúla til vaksnamannaútbúgving í øllum Evropa

Evropa skal vera ein vitanardepil, og tað skal vera attraktivt at koma higar at útbúgva seg og virka. Tað er endamálið við stóru útbúgvingarverkætlanini hjá ES, nevnd Lifelong Learning Programme, stytt LLP.

Útbúgvingarverkætlanin fevnir um árini 2007 til 2013, og endamálið er at fremja evropeiskt samstarv um útbúgving. ES hevur sett heilar 7 milliardir evrur av til endamálið, sum einstaklingar og bólkar í øllum aldri kunnu søkja um stuðul frá.

Upprunaliga var ætlanin at arbeiða fyri, at Føroyar eisini kundu gerast ein partur av skipanini, men tað arbeiðið tykist verða mestsum steðgað, hóast tað heði verið av stórum týdningi fyri okkum at verið við, har tað veruliga hendir.

## Fýra málbólkar

Verkætlanin er býtt í fýra partar, sum venda sær til ymsar málbólkar.

- **Comenius – barnaskúli og miðnámsútbúgvingar.** Endamálið er at stuðla samstarvi millum skúlar t.d. við projektsamstarvi og umbýti av flokkum. Eisini eftirútbúgving av lærarum, leiðslu og øðrum starvsfólkum í skúlaverkinum, uppihald til útlendskar stuðulslærarar, menningarverkætlanir fyri lærarar og luttøku í evropeiskum netverkum.

- **Leonardo – vinnuskúlar og yrkisútbúgvingar.** Serskráin Leonardo vendir sær til vinnuskúlar, felagsskapir og til almennar og privatar fyritøkur, sum arbeiða við yrkisútbúgvingum á øllum útbúgvingarstigum. Leonardo stuðlar lesandi og lærlingum, ið fara í starvsvenjing í øðrum landi, og starvsfólki, ið samstarva í netverkum og verkætlanum á vinnuøkinum.

- **Erasmus – hægri útbúgving** Serskráin Erasmus er flaggskipið hjá ES innan hægri útbúgving. Skipanin eggjar lesandi og starvsfólkum við hægri lærustovnar at taka part av útbúgvingini – ella at arbeiða á universiteti – í øðrum ES landi í eitt tíðarskeið. Talan kann m.a. vera um lesnað sum skiftisnæmingur, málskeið, intensiv skeið, verkætlanarsamstarv og umbýti av lærarum og øðrum starvsfólki.

- **Grundtvig – vaksnamannaútbúgving og fólkaupplýsing.** Hesin bólkurin hevur til endamáls at stuðla vaksnamannaútbúgving, fólkaupplýsing og lívslangari læring. Grundtvig stuðlar m.a. eftirútbúgving av lærarum, ið undirvísa vaksnum, starvsvenjing fyri lærarar á hesum øki og skeið í útlondum fyri vaksnar skeiðsnæmingar.

Harumframt er ein tvørgangandi skipan, "Transversal Programme", ið virkar fyri samstarvi tvørturum virksemið í einstøku LLP-skipanunum, og Jean Monnet-skipanin, sum vendir sær til serfrøðingar á hægri lærustovnum, sum arbeiða við evninum integrasjón í Evropa.